# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um testiskrabba

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um testiskrabba

Illgruni um testiskrabba skal íkoma um:

- Óvanliga støddarøktur testikul uttan illgruna um ígerð ella aðra upplagda orsøk
- Støddarøktur testikul eftir at antibiotikaviðgerð er givin fyri illgruna um epididymit/orchit
- Hækkað HCG ella alfa-foetoprotein (AFP)
- Ein ósløtt ífylla í testis
- Nýuppstaðið gynækomasti hjá yngri monnum (HCG-framleiðandi knykil)
- Hækkað AFP í blóðinum, ið ikki kann forklárast við livrasjúku

Við ávísing skal greiðast frá

- Sjúkueyðkennum, og hvussu leingi tey hava vart
- Illgruni um metastasur, t.d. hosti ella pínu í beinagrind (serliga ryggi)
- Komorbiditetur

## Vandabólkar

- Kontralateralur testiskrabbi
- Manglandi descensus, har testis ikki eru komnir niður í pungin. Menn føddir við kryptorkismu hava 4-5 ferðir øktan vanda fyri testiskrabba - allarhelst enn hægri við bilateralari kryptorismu
- Testiskrabbi hjá nærmastu avvarðandi - t.e. foreldur og systkin
- Lága sáðgóðsku
- HIV

## Títtleikin í DK

300 nýggj sjúkuherðindi um árið í DK, ið svarar til 10/100.000 menn.

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um testiskrabba" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining"
í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026